Onglendinurin Craig Dean:

# Av Old Trafford á Sevmýri

**Nýggi TB-leikarin hevur í ungdómsárunum spælt saman við fótbóltsstjørnum, sum Beckham, Butt, Neville og Gillespie**

SPÆLARASKIFTIÐ
*Páll Holm Johannesen*

Fríggjamorgunin var ætlanin, at TB og enski miðvallarin, Craig Dean, skuldu skriva undir ein leigusáttmála fyri seinni hálvu av føroysku landskappingini. Partarnir eru samdir um treytirnar í sáttmálinum, men seinasta undirskriftin vantar framvegis. Í løtuni er Craig Dean knýttur at enska felagnum Kidderminister Harriers. Hann hevur í longri tíð verið skaddur, og er í løtuni við at koma fyri seg.



*Unglingarnar hjá Manchester United frá 1992, við stjørnum sum David Beckham, Nicky Butt og Gary Neville á liðnum. TB-leikarin Craig Dean var ikki við fyrr enn árið eftir*

### Fortíð við Manchester United-unglingunum

Craig Dean var í ungdómsárunum knýttur at enska stórfelagnum Manchester United. Hann er frá árganginum 1975, og er 26 ára gamal. Árgangirnir 1974 og 1975 eru gyltir árgangir hjá Manchester United. Leikarar sum Gary og Phil Neville,Nicky Butt, Paul Scholes, David Beckham, Ryan Giggs, Robbie Savage, Keith Gillespie og Jovan Kirovski eru allir spælarar, ið eru føddir í hesum tíðarskeiðnum.

Bæði í1992 og 1993 var spældi unglingaliðið hjá Manchester United seg fram í FA Youth Cup finaluna. Í 1993 var Craig Dean við á unglingunum hjá Manchester United, og ímillum liðfelagarnir taldust so mætir fótbólsspælarar sum Beckham, Neville brøðurnum, Butt, Gillespie, Savage og Kirovski. Hetta kann tykjast lítið sannlíkt, at spælari við fortíð í Manchester United er endaður á Tvøroyri, men

Sosialurin hevur leitað sær fram gomul Manchester United bløð frá 1993 og 1994, og har er Craig Dean nevndur sum ein av miðvallaleikarunum á unglingaliðnum.

Sir Alex Fergusson hevur fleiri ferðir róst unglingaliðnum fyrst í 90-árunum, sum hann metir verða teir bestu í felagnum nakrantíð. Tá Manchester United á sumri ´96 valdi at sleppa sær av við so týðandi leikarar, sum Andrei Kanchelskis, Paul Ince og Mark Hughes, prógvaði Ferguson, at hann hevði álit á teimum ungu stjørnunum. Uttan himpr, vórðu spælarar sum Beckham, Scholes, Butt, og Neville brøðurin settir inn á liðið, og tá árið var av, hevði United vunnið greipuna. Eisini í Treble-liðnum trý ár seinni, vórðu spælarar frá unglinga-liðnum tær berandi kreftirnar.

Av Tvøroyri siga tey, at Craig Dean sigur, at hann enn heldur sambandið við liðfelagirnir frá 1993 við líka, og teir plaga at møtast nakrar ferðir um árið. Ikki kann sigast, at fótbóltslagnan hjá Craig Dean hevur verið líka glæsilig, sum hjá liðfeløgunum frá Manchester United . Hann spældi í unglingadeildini hjá United í 93 og 94, og í 1995 var hann at finna á eykaliðnum.

Hann varð leyslatin í 1995 av United, og hevur síðan spælt í Sogndal og eitt skiftið í USA. Í Sogndal var Craig Dean m.a. liðfelagi hjá Julian Johnsson, Kurt Mørkøre og Hans Fróða Hansen. Nú er hann so endaður á Tvøroyri, har hann skal royna at tryggja TB-liðnum framhaldandi sess í bestu føroysku fótbóltsdeildini

Craig Dean kemur rættiliga av eini fótbóltsfamilju, systurin er gift við fyrrverandi Manchester United og Leeds stjørnuni, Lee Sharpe, og eisini hevur hann eitt systkinabarn, sum eru við í 1. liðs hópinum hjá Aston Villa.

### Ætla sær ikki at arbeiða í Føroyum

Vanligt er, tá útlendingar koma hendavegin at spæla fótbólt, at teir umframt fótbóltin, eisini hava arbeiðið við síðurnar av. Craig Dean ætlar sær ikki at arbeiða, meðan hann steðgar í Føroyum. Hann ætlar sær at venja tvær ferðir um dagin, so hann kemur í form, tá hann kemur niðuraftur til Kidderminister.

Craig Dean kom til Føroya annan týsdag, og er nú fari heim í summarfrítíð. Hann skal ætlandi verða í Føroyum aftur 22. juni, tá TB fer undir fyrireikingarnar til seinnu hálvu.

# Kappróðurin beinleiðis á internetinum

**Róðrarsambandið hevur givið Miðvágs Róðrarfelag loyvi til – sum eina roynd – at sjónvarpa kappróðurin beinleiðis á internetinum**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Seinnapartin í dag verður fyrsta síðan í einum nýggjum kapitli skrivað í føroyskari kappróðrarsøgu. Fyri fyrstu ferð nakrantíð fer at bera til at fylgja beinleiðis við í kappróðri. Ikki bara í útvaprsfrásøgnini, sum er so kend, og sum hevur so at siga borið kappróðrinum uppi, síðani Útvarp Føroya fór at senda í 1957.

Men í dag fer at bera til at fylgja við á skíggjanum. Tað fer at bera til at fylgja við á internetinum. Adressan er krf.fo. Hetta er heimasíðan hjá Klaksvíkar Róðrarfelag, sum frammanundan er sera áhugaverd, og sum seinnapartin í dag verður uppaftur áhugaverdari.

Tað er Miðvágs Róðrarfelag, sum hevur tikið stig til sjónvarpingina, sum verður av endaspurtunum í teimum seks FM róðrunum.

Hannis Joensen, formaður í Róðrarsambandinum, sigur, at teir hava fingið eina umsókn frá Miðvágs Róðrarfelag, og at teir hava givið teimum loyvi at senda beinleiðis um internetið:

– Vit hava aðrar sáttmálar, sum vit sjálvandi hava hugsað um. Eftir at hava kannað viðurskiftini hava vit gjørt av at geva loyvi til hesa royndina, sum vit halda vera áhugaverda, sjálvt um teir, sum skipa fyri, undirstrika, at talan er um eina roynd.

### Møguleikin er har

Tá Sjónvarp Føroya fyri heilt fáum árum síðani fór at senda endaspurtirnar frá teimum seks FM kappróðrarstevnunum, varð tað millum róðraráhugað mett sum stórt framstig, sjálvt um hetta var at síggja í sjónvarpinum fyrst tríggjar og so tveir dagar eftir, at kappingarnar høvdu verið.

Teknisku møguleikarnir eru stórir, og menningin gongur við rúkandi ferð. Tí er tað ikki undarligt, at tað nú verður roynt at senda kappróður á internetinum.

Tað er Kristian Eli Zachariasen, formaður í Klaksvíkar Róðrarfelag og umsitari av heimasíðuni hjá róðrarfelagnum í Klaksvík, sum stendur fyri royndini. At hjálpa sær hevur hann Jónleif Jørgensen, sum er í nevndini í Miðvágs Róðrarfelag, og sum dagliga arbeiðir hjá Føroya Tele.

– Hetta er ein fyrsta roynd. Vit hava akkurát fingið skrivliga loyvi frá Róðrarsambandinum, sum sigur, at vit hava loyvi at senda, segði Jónleif Jørgensen fyrrpartin í gjár.

Kristian Eli Zachariasen heldur ikki, at munurin millum at taka myndir og at senda livandi myndir er serliga stórur, men hann undirstrikar enn eina ferð, at talan er um eina roynd:

– Vit seta eitt upptøkutól upp dygst við málið. Har hava vit á undanfarnu stevnunum tikið myndir upp, sum eru lagdar út á heimasíðuna hjá okkum. Munurin frá teimum ferðunum og til hesa ferð er, at nú tekur upptøkutólið livandi myndir, sum umvegis telduna fara beinleiðis á internetið. Talan verður um eina forskjóting upp á nøkur heilt fá sekund, men tað verður so gjørt beinleiðis. Sjálvandi verður góðskan treytað av, at vit bara hava eitt upptøkutól, men hetta er ein roynd, sum vit rokna við, at fleiri fara at hava áhuga í, sigur Kristian Eli Zachariasen, sum er formaður í Klaksvíkar Róðrarfelag.

Á heimasíðuni krf.fo er meiri at frætta um royndina og hvat skal til fyri at tað skal bera til at fylgja við.



# Klaksvík í sorg



JARÐARFERÐ
*Ragnhild Elingsgaard*

Hósdagin klokkan 13.30 stóð tíðin í Klaksvík still, meðan býurin var íklæddur tann tyngsta sorgarkappan. Inni í Christianskirkjuni sótu øll tey, ið ynsktu at fylgja 21 ára gamla Høgna á Steig til hansara seinasta hvíldarstað her á foldum. Hesin ungi drongur lat lív sítt í eini syndarligari ferðsluvanlukku í heimstaðnum seinasta vikuskiftið. Ein vanlukka, sum fyri tey flestu tykist óskiljandi og púra meiningsleys.

Eftir Høgna sita foreldur, systkin, genta, dóttir og eitt ótal av vinum. Fyri tey má hesin syrgiligi tilburður sýnast uttan enda, og tungt er at koma ígjøgnum saknin og sorgina, sum fer at vísa seg komandi tíðina.

Høgni hevði nógvar vinir, og var ein sera avhildin drongur. Hetta sást eisini aftur á mongdini, sum ynskti at sýna honum hendan síðsta heiður.

Hóast kirkjan er stór og rúmlig, so var trongligt inni hesa løtuna. Høgni á Steig var ein lívsglaður drongur, og mundu flest allir klaksvíkingar kenna hendan smílandi unglinga av navni. Av tí sama er torført at skilja, at vit ikki longur koma at síggja Høgna koma gangandi eftir gøtunum í Klaksvík.

Meginparturin av fólkinum í kirkjuni vóru ung fólk í besta blóma. Ung fólk, hvørs lív júst veruliga er byrjað. Eingin dugir at síggja nakað endamál, og eingin skilir, hvussu eitt lív kann slókna so brátt.

Tó sær ein hendan dagin, at lívið bert er til láns í eina stutta stund, og at vit kenna ikki dagin í morgin.

Prestur helt eina sera góða talu, har hann millum annað eisini kom inn á, hvørja gleði, Høgni hevur veitt sínum nærmastu ta stuttu tíðina, hann fekk her á fold.

Hetta var sami prestur, sum bæði hevur doypt og fermt Høgna í somu kirkju. Og nú eisini fylgt honum til hansara síðsta hvíldarstað.

Spurningarnir eru nógvir, men svarið kennir eingin. Vit vita ikki, hví tað hesu ferð skuldi gerast júst Høgni, sum varð tikin frá hansara nærmastu. Vit kenna og skilja heldur ikki teirra sorg, men drýpa okkar høvur í djúpastu samkenslu.

Eisini lata vit tankar okkara leita til hinar báðar unglingarnar, sum vóru í sama bili sum Høgni, tá vanlukkan hendi. Vónandi finna teir styrki til at koma ígjøgnum hesa sváru tíð.

Mátti hendan syrgiliga vanlukka lært okkum onnur at virðismeta tað lív, ið vit hava.

Við hesum ynskir Sosialurin at lýsa frið yvir minnið um Høgna á Steig, hvørs lív endaði alt ov brátt.

Mátti Harrin styrkt øll tey avvarðandi í hesum og komandi tungu tíðum. Sosialurin djúpastu samkenslu.

*Góða mamma, alt eg gloymi*
*alt tað, sum eg sá í dag*
*langt burtur eg meg droymi*
*til ein fagran, fríðan stað.*

*Har man Jesuspápi búgva*
*vakrar blómur vaksa har*
*langt,*
*hagar hvítir einglar flúgva*
*flúgva einaferð við mær.*


